## UTTAN ÚR HEIMI

### Mesic vann fyrra umfar

Alt bendir á, at kroatiski forsetin, Stipe Mesic, verður afturvaldur.Á valinum sunnudagin fekk hann 49 prosent av atkvøðunum, meðan tað mótvalevnið, sum kom honum næst, varaforsætisráðharrin Jadranka Kosor, fekk sløk 21 prosent. Rey bæði skulu nú til eitt seinna valumfar, sum verður tann 16. januar.

Undir valstríðnum hevur tann 70 ára gamli Stipe Mesic havt kroatiskan limaskap í ES sum eitt av sínum høvuðsmálum. Á einum tíðindafundi sunnukvøldið segði hann, at á seinna valumfarinum skulu kroatar taka støðu til, um Kroatia skal fara inn í 21. øld saman við Evropa, ella um landið skal venda aftur til fortíðina.

Valluttøkan sunnudagin var bara 51 prosent, og Stipe Mesic heitti sunnukvøldið á fólk um at fara á val, tá seinna valumfar verður.

### Eigarin tikin

Løgreglan í Argentina hevur avdúkað, at neyðhurðarnar í diskotekinum, sum eldur kom í hóskvøldið í síðstu viku, vóru læstar við ketum og heingilásum. Tað var ein høvuðsorsøk til, at eldsbrunin kostaði 175 ungfólkum lívið, og at næstan 900 onnur fingu brunasár.

Sunnudagin gjørdi løgreglan av at handtaka mannin, sum átti diskotekið, og hann er nú ákærdur fyri grovt brot á lógina um trygd á dansistøðum, sigur CNN. Løgreglan hevði av fyrstan tíð illgruna um, at eldurin stóðst av fýrverki, men tað er ikki prógvað enn.

Sambært løgregluni í Buenos Aires vóru umleið 2.000 ungfólk inni í diskotekinum, tá eldurin kyknaði. Borgarstjórin í býnum, Anibal Ibarra, hevur lovað, at málið verður kannað til botns, og at tann ella tey seku verða revsað.

### Blóðugt nýggjár í Kolombia

Ein nýggjársveitsla í kolombiska býnum Tame endaði í einum blóðbaði, tá vápnaðir menn lupu á veitslufólkið og skutu minst 17 teirra. Millum tey deyðu vóru seks kvinnur og fýra børn.

Kolombisku myndugleikarnir hava givið víðgongda marxistiska felagsskapinum FARC skyldina av álopinum. Nøkur av teimum, sum sluppu livandi frá álopinum, hava greitt frá, at álopsmenninir løgdu tey undir at stuðla teimum víðgongdu høgrabólkunum, sum berjast ímóti FARC. Samanbrestir eru javnan ímillum partarnar, og báðir partar verða lagdir undir at drepa stuðlar hjá mótpartinum.

Álopið á veitsluna í Tame hendi dagin eftir, at FARC-leiðarin Jevenal Ricardo Palmeraa varð sendur til USA, har hann er skuldsettur fyri rúsevnasmugling og gíslatøkur. Palmeraa er tann fyrsti FARC-leiðarin, sum er sendur til USA til rættarsókn har, skrivar Reuter.

### 1,3 mia. fólk í Kina

Almenna kinesiska tíðindastovan, Xinhua, veit at siga, at í hesari vikuni fer kinesiska fólkatalið upp um 1,3 milliard.

Kinesiska fólkatalið hevur í fleiri ár ligið beint niðan fyri 1,3 milliard, men nú fer tað so uppum. Kinesisku myndugleikarnir hava í fleiri ár skipað fyri tiltøkum, sum skulu tálma fólkavøkstrinum. Eitt nú hava hjún ikki loyvi at fáa sær meiri enn eitt barn, og serfrøðingar siga, at uttan hesi tiltøkini var fólkatalið farið upp um 1,3 milliard fyri fýra árum síðani.

Meiri enn ein fimtapartur av øllum heimsins íbúgvum búgva í Kina.



*Tað verður eitt ovurhonds tak hjá altjóða samfelagnum at endurreisa tey oyðiløgdu økini. Serliga indonesiski landsparturin Aceh er illa farin, soleiðis sum hendan myndin eisini vísir*

*Mynd: Reuters*

# Toppfundur um at endurreisa Suðurasia

**Hósdagin hittast umboð fyri fleiri lond í Indonesia, har tey fara at umrøða, hvussu tey oyðiløgdu økini skulu endurreisast**

FLÓÐALDA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Samstundis summ talið á deyðum aftan á flóðalduna í Suðurasia er komið upp um 150.000, fyrireika fleiri politiskir leiðarar kring heimin seg til at fara til Indonesia at umrøða, hvussu tey oyðiløgdu økini skulu endurreisast.

Indonesiski forsetin, Susilo Bambang Yudhoyono, hevur boðið umboðum úr 17 londum til Jakarta, og fleiri av londunum hava boðað frá, at tey fara at senda umboð á fundin. Eitt nú hevur japanski forsætisráðharin, Junichiro Koizumi, sagt, at hann fer til Jakarta, og tað sama sigur kinesiski forsætisráðharrin, Wen Jiabao. Somu boð eru komin frá forsætisráðharrunum í Avstralia, Ný Sælandi, Suðurkorea og Singapore. ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, kemur á fundin saman við Jan Egeland, varaaðalskrivara, sum hevur ábyrgdina av at samskipa ST-hjálpartiltøkini í vanlukkuøkinum. .

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, kom til vanlukkuøkið sunnudagin, men tað er ikki greitt, um hann fer at taka lut á fundinum hósdagin. Í Danmark er fráboðað, at Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, fer til Indonesia, og tað sama ger norski uttanríkisráðharrin, Jan Petersen.

### 44 lond stuðla

Í gjár vóru umleið 14 milliardir krónur játtaðar til arbeiðið at hjálpa teimum neyðstøddu í Suðurasia.

Japan hevur játtað at lata umleið 2,5 milliardir krónur og USA umleið 1,8 milliard. Bretland hevur latið 500 milliónir krónur, Svøríki góðar 400 milliónir, Spania 380, Kina 340, Frakland 320, Danmark 300, Avstralia 250, ES 220, Kanada 180, Niðurlond 180, Týskland 140, Írland 140, Noreg 100 og Finnland 30 milliónir krónur. Herumframt hevur Heimsbankin latið 1,2 milliard krónur.

Fleiri oljulond hava eisini játtað pengar til hjálpararbeiðið. Qatar hevur játtað 140 milliónir krónur, Saudiarabia 50, og Kuwait, Venesuela, Algeria, Sameindu Arabisku Emiratini og Libya hava játtað 10 milliónir í part.

Fleiri lond hava kunngjørt, at tey fara at lata meiri. Eitt nú hava bæði Danmark og Noreg nevnt, at tey fara kanska at lata eina milliard krónur í part.

# Bretsk skúlagenta bjargaði 100 øðrum

**Tann 10 ára gamla Tilly Smith visti, hvat var á vási, tá tað brádliga fjarðaði á strondini í Maikhao**

FLÓÐALDA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Umleið 100 ferðafólk vóru stødd á Maikhao-strondini í Teilandi, tá tann stóra flóðaldan nærkaðist landi.

Millum teirra vóru tann 10 ára gamla bretska gentan Tilly Smith og mamma hennara, sum vóru farnar til Teilands at halda jólafrí. Stutt undan frítíðini hevði skúlaflokkurin hjá Tilly gjørt eina uppgávu um flóðaldur, sum standast av jarðskjálvtum undir havbotninum, og tá Tilly sá, at sjógvurin brádliga rann út frá strondini, visti hon alt fyri eitt, hvat var á vási. Hon segði mammu síni frá, og tað eydnaðist teimum báðum at ávara hini fólkini, sum vóru har.

Sambært teilendsku myndugleikunum kravdi flóðaldan einki mannalív á Meikhao-strondini takkað verði teirri 10 ára gomlu gentuni.